# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

**Ruth Olsen**
fødd Isaksen

andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 6. apríl, 70 ára gomul.
Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 17.30.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer hósdagin kl. 13.30.

*Vegna tey avvarðandi*
**Jákup N. Olsen**

## Tøkk

Eg takki hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá mín kæra kona

**Thala Rensiustein**
Klaksvík

andaðist og fór til gravar.
Takk til starvsfólkið á sambýlinum í Bøgøtu, og ein serstøk tøkk til Kristin Ryan.
Takk til prest, kirkjutænarar, sangarar, berarar og tykkum, ið bakaðu og hjálptu til við ervinum.
Takk fyri kransar, blómur og gávur til Klaksvíkar kirkju.
Og takk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Morensius Rensiustein**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum øllum, sum mintust meg á 85 ára degnum tann 17. mars.
Ein serlig tøkk til Regin fyri góð orð, og ein serlig tøkk til Ingu og Tórhild, sum sungu so vakurt fyri mær.
Eisini ein serlig tøkk til tykkum mongu, sum hjálptu til, so dagurin bleiv so sera hugnaligur.

Harrans signing í framtíðini

**Kærar heilsanir**
**Salmona Christinasen**

**Dagurin**
**10. apríl. Ezekiel**. Ein av teimum fýra stóru profetunum í Gamla testamenti. Navnið merkir Guð er sterkur.

# Millumskúlaflokkur í 1959



Mynd frá ”Realskúlaframsýningini 1916-66”, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn summarið 2007. Her er 4. millumskúlaflokkur í 1959 uttan fyri húsini hjá Ludvig Petersen, lærara.

Næmingarnir standa í hesi raðfylgju f.v.: Solveig Bjørk, ókend, Elsa Ellingsgaard, Karin Joensen, Mathilda Johansen, Rannvá Joensen, Ruth Johannesen, Jenny Joensen, Hjørdis Egholm, Eyðfinn Hansen, Bjarni Johansen, Bárður Jacobsen, Freddy Cook, Jonsvein Jensen og Anders Harboe Ree. Smádrongurin fremst á myndini er Petur Birgir, sonur Ludvig Petersen.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024.

*Myndaeigari: Jenny Simonsen*

# MC-Gudstænasta í Hoyvíkar kirkju

Tað fyrsta av ársins MC-tiltøkum, verður hildið nú leygardagin 12. apríl, tá ein MC-Gudstænasta verður hildin í Hoyvíkar kirkju kl. 16.00. Tað verður Jógvan Fríðriksson, bispur, ið kemur at prædika og nógv sangluttøka verður eisini á skránni. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tað er vorðin føst siðvenja, at MC-árið byrjar við eini MC-gudstænastu. Hesar hava fyrr verið hildnar í Vesturkirkjuni í Havn og Christianskirkjuni í Klaksvík, og hesuferð er so valið fallið á nýggju Hoyvíkar Kirkju.



### MC-tiltak í Hoydølum

Frammanundan gudstænastuni hittast MC-fólk úr øllum landinum til eitt MC-tiltak, ið byrjar uppi við Studentaskúlan í Hoydølum kl. 12.00, har ymiskt undirhald, grill og annar hugni verður. Eisini er neyðugt, at tað sosiala umhvørvið verður hildið, so fólk fáa hugnað sær saman, áðrenn ein felags koyritúrur verður fyriskipaður.

### Felags koyritúrur

Kl.15.00 er ætlanin at skipa fyri felags koyritúri kring Havnina eftir Ringvegnum til Velbastaðar og Kirkjubøar, fyri síðani at koyra aftur til Havnar gjøgnum miðbýin og út eftir Strondvegnum og beinleiðis niðan í Hoyvíkar Kirkju, har gudstænastan byrjar kl. 16.00.

### Gudstænastan

Tað verður Sonja Klein, prestur, ið kemur at leiða gudstænastuna og Jógvan Fríðriksson, bispur, kemur at prædika. Umframt felags sálmasang, verður eisini skipað fyri sangluttøku, har t.d. Sólva Ford saman við bólki kemur at framføra 2 sangir. Guitarspælarin Ragnar Olsen kemur at framføra klassiskt guritaspæl, og Mirjam Carlsen og Kristian Ludvík Dam koma at syngja ein sang, sum er týddur úr norskum.

### Talvan gongur

Avtalað er, at talvan gongur til frama fyri nýggja útgávu av tí Albansku Biker-Bíliuni, sum eftir ætlan skal deilast út, í samband við ferð, sum teir kristiligu klubbarnir í Europa skipa fyri fyrst í august mánað í ár. 10.000 eintøk verða borin út t.d. til fongsul, MC-klubbar og fólk úti á gøtunum. Vitjað verður í høvuðsstaðnum Tirana.

Gudstænastan er almenn og eru øll hjartaliga vælkomin.

Tað er felagið Cross-Bikers MC Føroyar, ið skipar fyri degnum sum heild. Meiri finnist at lesa á heimasíðuni: www.cross-bikers.com.